## Atlantsflog skiftir út

Tey eldru flogførini hjá føroyska flogfelagnum verða nú skift út. Atlantsflog hevur gjørt av at ogna sær nýggj flogfør ístaðin fyri tey gomlu. Felagið hevur júst keypt eitt nútímans flogfar av slagnum British Aerospace, og í november kemur ætlandi eitt afturat. Flogførini, sum Atlantsflog nú hevur, eru eisini av slagnum British Aerospace, men Magni Arge, stjóri, sigur við útvarpið hjá Kringvarpinum, at felagið arbeiðir við ætlanum um at keypa onnur flogfør enn BA. Stjórin sigur, at Atlantsflog fer at eiga fimm ella seks flogfør, tá útskiftingin er liðug.



## Joan Ørting til menn

23. november kemur Joan Ørting, sexologur, aftur til Føroyar at halda fyrilestur. Joan var í Føroyum fyrr í ár, har hon Hotel Føroyar við føroyskum kvinnum, sum vildu hoyra "meira av tí góða". Hesaferð verður fyrilesturin til mannfólk. – Joan gleðir seg at fortelja føroysku mannfólkunum, hvussu teir skulu geberda seg í songini, siga fyrireikararnir. Fyrilesturin er til mannfólk, men kvinnur eru eisini vælkomnar, hóasta talan er um eitt ordans mannfólkakvøld. Enn er ikki avgjørt, hvar fyrilesturin verður, men fyrireikararnir royna í hesum døgum at finna eitt "serligt" stað, sum kann geva tann rætta intima stemningin.

# Góða søgan selir F



*Tórunn Ellingsgaard og Katrin á Neystabø á skrivstovuni uppi á loftinum í Vinnuhúsinum*

*Mynd: Alvin Elleby Andersen*

**Føroyskt vinnulív brúkar alt ov nógva orku til at sannføra umheiminum um, at vit eru álítandi samstarvsfelagar. Tí skulu vit geva útlendsku tíðindafólkunum góðar og spennandi søgur við heim á blokkinum. Hetta er uppgávan hjá Tórunn Ellingsgaard, sum hevur úr at gera í hesum døgum. Samstundis fyrireikar hon seg til at vera vertinna í Norðurlandahúsinum mánadagin**

CLINTON-VITJANIN
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo.*

Enn eru onkrir snøklar eftir at fáa uppá pláss, áðrenn stóra dagin, tá fyrrverandi amerikanski forsetin Bill Clinton leggur leiðina framvið lítlu Føroyum.

Týsmorgun er, og 36 ára gamla Tórunn Ellingsgaard, journalistur, ella Press Coordinator hjá House of Industry, situr longu við skrivaraborðið uppi á loftinum í rúmliga hvíta minislottinum hjá Vinnuhúsinum á Ternuryggi.

Inn kemur unga Katrin á Neystabø, sum komandi vikuna verður høgra hond Tórunnar. Hon er farin undir seinasta partin av útbúgvingini sum cand.merc í Århus, og hevur tíð til at taka sær eina viku ella tvær uppi í Føroyum. Í dag skal hon so setast inn í alt um pressuna og vitjan Clintons.

- Eg havi onki við alt tað praktiska at gera. Tað orna tey í Vinnuhúsi num. Mínar uppgávur eru líkasum býttar upp í tvey. At taka mær at pressuni, og so at vera vertinna sjálvan dagin í Norðurlandahúsinum, greiðir Tórunn Ellingsgaard frá. Fær sær ein slurk av te úr einum café-glasi við vatni og teposa. Handar Katrini yvirlitið yvir útlendsku tíðindafólkini.

- Hesin skal hava hjálp til at finna keldur um olju og fisk, greiðir hon frá, og peikar niður á navnið á einum tíðindamanni, sum longu er komin til landið.

### Kenna okkum ikki

Endamálið við at fáa Clinton hendan vegin er at gera umheimin varugan við, at vit eru til. Tí er ein av høvuðsuppgávunum at geva útlendsku tíðindafólkunum góðar og spennandi søgur við heim á blokkinum. Sagt verður, at helmingurin av øllum heimsins borgarum fáa í minsta lagi ein tíðindastubba frá AP hvønn dag.

- Av tí at útlandið ikki kennir Føroyar, brúka til dømis føroysku bankarnir alt ov nógva orku til at sannføra útlendsku samstarvsfelagarnar um, at teir eru álítandi og kunnu javnmetast við danskir og norskir pengastovnar. Ella í mun til útflutning, har vanligi brúkarin helst skal kenna mun á einum fiski úr Føroyum, fiskaður í reina Norðuratlantshavi, og einum úr Eystursjónum, sigur Tórunn Ellingsgaard.

### Góða søgan besta reklaman

Innan miðlaheimin er tað hin góða søgan, ella hugtakið Storytelling, sum arbeitt verður við, fyri at fanga ávísar málbólkar. Hóast fyrra ferðin hjá Clinton varð útsett, vitjaðu átta útlendsk tíðindafólk her longu tá. Aftaná vóru í øllum førum tríggjar søgur úr Føroyum endurgivnar í miðlunum kring allan heimin. Har var søgan frá AP, Tolkien tales come alive in unspoiled Faeroe Islands, sum var at finna líka úr Meksiko til Kina. Eisini søgan um føroyska drongin, sum í mølini fann eitt ur, ið hevði verið grivið niður á Norðpólinum, gav afturljóð um allan heim.

- Ein søga, sum fangaði áhugan hjá fleiri av tíðindafólkunum seinast, vóru nýggju granskingarúrslitini hjá Boga Hansen, professara í havfrøði, um veðurlagsbroytingar og havstreymar. Hon kom við nýggjum tilfari til eitt aktuelt orðaskifti, og setti á hendan hátt bæði Føroyar og Boga Hansen á heimskortið í nakrar dagar, sigur Tórunn Ellingsgaard, sum heldur, at góða søgan er hon, sum vekir áhuga, tí fólk kenna seg sjálvi, ella okkurt annað, aftur í henni.

### Fóðra pressuna

Tíðindastreymurin rekur so skjótt, og tíðindafólkini eru von at sálda millum søgurnar við harðari hond.

- Tí snýr tað seg um at hava eina breiða viftu við søgum, sum vit kunnu tippa tey um. Bíta tey ikki á eftir einum hálvum minutti, mugu vit freista tey við einari aðrari, og vóna at tey hekta seg á krókin – og ongantíð betur, um tey kenna á sær, at tey sjálvi hava funnið søguna, greiðir Tórunn Ellingsgaard frá. Hetta er eisini orsøkin til, at tey hava fyrireikað ein keldulista til tíðindafólkini, soleiðis, at um tey ynskja at tosa við onkran um eitt nú grind, olju, fisk ella umhvørvi, so finna tey serfrøðingar innan hvør sítt øki á listanum.

- Hetta eru sjálvandi fólk í Føroyar, sum eru viðkomandi fyri evnið og sum duga mál. Eisini rokna vit við, at tey tekna eina mynd av Føroyum, sum vit meta vera gagnliga, sigur Tórunn Ellingsgaard.

Eisini hava fyrireikararnir fingið eitt samstarv í lag við AP, so greinar, sum ein føroyskur journalistur skrivar á enskum, verða sendar teimum, har tær síðani verða snøggaðar til. Veit væl við, verða tær eisini endurgivnar í miðlunum úti í heimi.

### Allir tøkir hentleikar

Tey 16 tíðindafólkini, sum koma, umboða AP, SKY, AFP, BBC World, Toronto Star, EU Observer, kinesiskt sjónvarp, Ritzau, Berlingske, Information, Fréttablaðið og Morgunblaðið í Íslandi. Tey búgva á ávikavist Hotell Føroyum og Hotell Tórshavn, og hava miðstøð í Miðlahúsinum í Vágsbotni, har høli, amboð og annað